


Karstin Hansen, sýslumaður í Klaksvík:

Meira ófriður undir føroyskum dansi


–Og vit rokna eisini við meira ófriði, tá lýst verður til gamlamannadans, sigur hann

Myndir: Kalmar

Hóast ólvenaður og ófriður ofta verður tengdur at, at ung hittast í dansi, so eru royndirnar hjá politinum í Klaksvík ótvísi.

–Tað er oftast slagsmál, tá lýst er til føroyskan dans og gamlamannadans. Tá lýst er til gamlamannadans er ofta rok. Eg veit ikki hví hetta er, men orsøkin er helst, at meir mannfólk er savnað saman tá, sigur Karstin Hansen.

–Tað var ikki føroyskur dansur fyrr, uttan at onkur fór til hendurs. Í dag er ikki nógvur hardskapur í dansi, men tá menn bresta saman í dag, so er tað oftast ógvusligari enn fyrr, sigur sýslumaðurin.



Karstin Hansen, sýslumaður situr her í tí eina klivanum á politistøðini í Klaksvík

Svav triggjar ferðir á støðini

Detentiónin á politistøðini í Klaksvík verður nógv nýtt á Norðoyarstevnu.

–Fólk koma inn her og sova rúsin út. So skjótt tey eru so fræg, so verða tey koyrd útafrur. Tað er eitt sindur óvant hvussu nógv fólk yvirnátta hjá okkum, men talið liggur vanliga frá 15-30 fólk, sigur Karstin Hansen.

Á politistøðini í Klaksvík eru tvær detentiónir ella klivar, sum tað eitur á føroyskum. Tí er neyðugt hjá politiónum at reiða upp aðrastaðir á støðini á Norðoyarstevnu.

–Vit hava nakrar madrassur og so leggja vit fólk ymiskarstaðir.

–Fyri nøkrum árum síðan minnist eg, at ein maður svav triggjar ferðir á støðini innan eitt samdøgur. Hann kom ongantíð av havnaøkinum og fekk ikki nógv burturúr stevnuni. Vit eygleiddu hann, so skjeggt hann var farin útafrur. hitti hann onkran kenning, sum bjóðaði honum snaps og so datt hann av, beint har sum hann stóð, sigur Karstin Hansen.

Eykamanning


Á Norðoyarstevnu fær fasta manningin á politistøðini í Klaksvík hjálp úr Eysturoynni og úr Havn.

Tað er serliga norðoyarstevnuaftan, at nógv er at gera og tá er ikki nógmikið við teimum nógglu politistunum, sum hoyra til støðina.

–Vit kanna nógvar bilar á Norðoyarstevnu, eg haldi, at hetta virkar fyribyggandi uppá rúsdrekkakoyring og fær fólk at seta bilin við hús, sigur Karstin Hansen.

–Men seinnu árini eru alt fleiri ung, sum koma á Norðoyarstevnu við bili, tey búgva í bilinum og har verður ballast. Annars er Norðoyarstevnar broytt í dag. Í dag kemur nógv fulkt fólk á stevnuna, tá hon byrjar, fólk sum ikki eru før fyri at vera á stevnu. Men nú fer eisini ein stórur partur av fólkinum avstaðaftur beinanvegin aftaná kappróðurin. Teistin siglir beinleiðis til Havnar. Og hetta førir við sær, at sunnunáttin verður fríðaligari, sigur Karstin Hansen.

justinus



Ikki slepst uttanum John Reid, tá tosað verður um Norðoyarstevnu. Hann er "the grand old man" og hevur óroyttliga stríðst fyri fríðarvirkseminum í Klaksvík.

John Reid Bjartalíð:

Ein onnur mentan

–Andin yvir Norðoyatstevnunum nú er ikki tann sami sum fyrr, mentanin er broytt, eg helt stevnuna vera hugnaligari fyrr, tá fólk lógu nátt sigur hann

Tá ein skal skriva nakað um Norðoyarstevnu, so er ringt at sleppa uttanum "the grand old man" innan ítrótt og annað fritíðarvirksemi í Klaksvík, John Reid Bjartalíð. Og hann hittu vit eisini týsdagin, tá vitjaðu. Fittur og blíður sum altið og hóast uppgevandi, tá vit spurdu hvussu visti við, so hoppaði hann í kring í stovuni sum ein 76 ára gamal unglingi, og kom rættuluga í essið, tá vit fóru at tosa um norðoyarstevnur fyrr.

Heimið hjá John Reid er áhugavert í sær sjálvum, tí hann hevur altið livað við øðrum beininum í fortíðini, væl at merkja tað positiva í fortíðini, og ikki bara myndirnar á veggjnum,og bókurnar vísa, at vit eru millum høgt mentað fólk. Eisini prátingarlagið hjá fyrrverandi KÍ-bossinum. John Reid Bjartalíð er eitt barn av ríku og positivu háskilatíðini. Hendan tíð hevur merkt hansara hugburð og skriving og ger tað framvegis.

Byrjaði í 1936

Norðoyarstevnan varð fyrstu ferð haldin í 1936. Og at Norðoyarstevnan júst verður haldin mánaðarskiftið mei/juni er ikki av tilvild.

–Hetta kemur frá tí tíðini, tá íslandsmiðini vóru álitið hjá føroyingum. Skipini vóru júst komin heim av Suður landinum um hesa tíðina og fólkið var heima. Tað vóru Hákun Djurhuus, Sámal Petersen, Petur Joensen, Símun Andreassen og Jóhan Rasmussen sum skipaðu fyri, sigur John Reid Bjartalíð.

–Fyrstu ferð er kom uppí at skipa fyri Norðoyarstevnu var í 1946. Hetta var eisini fyrsta árið, at fritíðar og ítróttarfelagini í Klaksvík skipaðu fyri. Eg ráði eisini kapp hetta árið við einum seksmanna

fari, men vit taptu. Við fótbóltinum gekst betri. Vit spældu móti TB og vunnu 2-1. Av temum sum tá vóru við á KÍ liðnum eru vit bert fýra eftir á lívi, sigur John Reid Bjartalíð.

Friðarstevna

Ongin Norðoyarstevna varð hildin undir krígnum og Hákun Djurhuus skipaði so fyri stevnu í 1945. Hesa stevnuna minnist John Reid Bjartalíð sera væl, tí tað var nakað serligt yvir hesi stevnu.

–Kríggið var júst av og fólk vóru glað í sinninum, ein myrk tíð fyri sjófólkið var av og tað setti dám á stevnuna, sigur hann.

Fólkafundir

Tíðin aftaná kríggið og til fimtiárini byrjaðu var fólkahákúlatíðin mikla hjá John Reid. Hann var eitt ár á Vallekilde og fleiri á Askov og hetta var ein rík tíð.

–Í 1948 hildu vit fyrsta fólkafundin á Norðoyarstevnu og hesir fundir hava síðan sett sín serliga dám á stevnuna, sigur John Reid Bjartalíð.

Og hvat fer so John Reid at gera á Norðoyarstev-nu?

–Nú eri eg so gamal, so eg veit ikki, men til kappróðurin farið eg, og fótbóltdyst, hvør veit. Annars ætli eg mær á miðnáttarsamkomuna og á fólkafund. Annars plaga nógv fólk at støkka inná gólvið, tað er eisini ein hugnaligur partur av stevnuni, sigur John Reid Bjartalíð.

justinus

Hendan myndin verður søga

Hetta verður seinastu ferð at klakksvíksingar loysa rúsdrekka út á hendan hátt til Norðoyarstevnu

Myndin ertikin klokkan trý týsdagin. Fólk frá posthúsinum í Klaksvík eru í ferð við at tøma eina bingju við rúsdrekka til norðoyarstevnuna.

Hetta verður seinastu ferð, at rúsdrekka kemur til norðoyarstevnu á hendan hátt. Við nýggiu rúsdrekkalógini kann ein fara inná einkarsøluna og keypa tað ein hevur brúk fyri og skamtingin fellur burtur. Tú kann keypa eina ella túsund fløskur.

Er nógv rúsdrekka komið til stevnuna í ár?

–Fyrst í vikuni sá tað út sum lítið var bestilt, men nú hava bróvini streyma inn, so tað verður nógmikið av brenniníni á Norðoyarstevnu, øll fáa nokk, sigur Jóin Sigurðsson, leiðari á posthúsinum.

